# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Sorin átti brotsspark

**Dómarin í dystin millum KÍ og EB/Streym, Petur Reinert, viðgongur blankt, eftir at hava sæð støðuna umaftur, at hann skuldi havt givið Sorin Anghel brotsspark: – Hatta var ikki nóg gott, viðgangi eg blankt, sigur dómarin**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Av og á kunnu hendingar vera í einum dysti, sum fáa sinnini í kók, og hjá onkrum kann enntá kóka yvir. So var nokk eftir dystin Krists Himmalsferðardag í Klaksvík, tá venjarin hjá EB/Streymi tók munnin so fullan, at tað kostaði honum karantenu í tveir dystir. Millum hendingarnar var eitt føri, har Sorin Anghel fór um koll inni í KÍ-brotsteiginum, men í staðin fyri brotsspark, fekk hann gula kortið fyri at filma.

Dysturin var tikin upp á sjónband og brot úr honum hava verið at sæð bæði í 3-2 hjá Kringvarpinum og í kykmyndunum á Portalinum. Millum teirra, sum hava hugt at støðuni nú aftaná, er eisini dómarin í dystinum, Petur Reinert.

– Har er ikki nógv at rafla um, tí nú eg havi hugt at støðuna umaftur á Portalinum, síggi eg, at Sorin Anghel heilt greitt skuldi fingið brotsspark. Uppaftur keðiligari er tað, at eg so kryddaði tað heila við at geva honum eitt gult kort, sigur Petur Reinert, sum tekur hetta fult og heilt á sín egna kappa.

– Tað er munur á, hvussu eg upplivdi støðuna undir dystinum, og nú á kykmyndunum. Eg upplivdi tað tá, sum at hann spældi bóltin ov langt frá sær og síðani datt, men har er altso eingin ivi um, at eg skuldi havt dømt brotsspark.

Petur Reinert harmast mistakið, men má tíverri bara ásanna, at í hasum førinum var hansara avrik ikki nóg gott, og at tað má hann so royna at betra. Hinvegin hevur hann ikki í kykmyndunum sæð nakra aðra støðu, har hann átti at dømt brotsspark.

– Eg skal vera tann fyrsti at viðganga tað, tá eg geri ein feil, og hetta er ein av teimum stóru, ið kann hava verið avgerandi fyri úrslitið. Tá vit døma, fara vit altíð inn á vøllin fyri at gera okkara besta, men eg má ásanna, at hetta var bara ikki nóg gott, sigur dómarin.

– Sjálvandi kunnu feilir altíð henda, men tað er sera umráðandi, at tær kritisku avgerðirnar eru rættar. Hetta er so nakað, eg noyðist at arbeiða við, tí eg vil sjálvandi ikki hava, at hatta endurtekur seg.



*Petur Reinert viðgongur blankt, at hann skuldi havt dømt brotsspark til EB/Streym í dystinum ímóti KÍ Krists Himmalsferðardag, tá Sorin Anghel var feldur*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*



*Sigfríður Clementsen sleppur ikki aftur á bonkin hjá EB/Streymi fyrr enn næsta vikuskiftið, tí hann fekk karantenu í tveir dystir fyri síni úttalilsi um dømingina í Klaksvík hósdagin*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Sigfríður fekk tveir dagar

**Venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen, fekk karantenu í tveir dystir, tí hann tók munnin ov fullan eftir 0-0 dystin ímóti KÍ hósdagin. Men hann heldur fast við, at Petur Reinert »tók nakrar sera óhepnar avgerðir í støðum, sum kundu havt avgerandi týdning fyri úrslitið«**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Eg føli, at ein ávísur Petur Reinert er ófatiliga óheppin í einum trimum støðum. Eg vil ikki siga fanansaktigur, men tað er tætt við, segði Sigfríður Clementsen í beinleiðis útvarpssamrøðu á Rás 2 eftir 0-0 dystin ímóti KÍ í Klaksvík hósdagin.

Henda útsøgn hevur nú kostað honum karantenu í tveir dystir, so hann slapp ikki at sita sum venjari á bonkinum, tá EB/Streymur í gjár tók ímóti ÍF við Margáir, og heldur ikki sleppur hann tað hóskvøldið, tá EB/Streymur í steypakappingini á heimavølli spælir seinnu hálvfinaluna ímóti AB.

Kappingarnevndin hevur tikið støði í tí, sum kallast »Óhøviskur atburður/málburður í sambandi við dyst og venjing«, og sum kann kosta karantenu í ein til tríggjar dagar, »um tað ikki er grundarlag fyri enn longri banni«, sum sagt verður í rundskrivi frá 2007.

– Eg haldi bara, at tað er flott, at Fótbóltssambandið nú ger skjótt av, tá karantenur verða givnar, so sleppast kann undan at bíða í fleiri vikur, sum tað onkuntíð hevur verið, sigur Sigfríður Clementsen í stuttari viðmerking.

– Eg ásanni, at eg havi uppiborið karantenuna, tí eg nokk segði ov nógv. Men eg haldi framvegis, at dómarin í dystinum tók nakrar sera óhepnar avgerðir í støðum, sum kundu havt avgerandi týdning fyri úrslitið.

## Bóltarnir lógu eftir

B36

B68

Tá greinin um dystin Krists Himmalsferðardag millum B36 og B68 í Gundadali kom í vikuskiftisblaðið, var hent tað mistak, at hvørki við liðunum fekk nakrar bóltar, sum annars er vanligt. Vit biðja lesarar okkara halda okkum til góðar og prenta her bóltarnar, sum helst søgdu meira um dystin enn úrslitið, ið annars var at B68 vann 2-0.